**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# Føroyameistarastevnu og Juniormeistarastevnu á langgeil 2023



| | |
|---|---|
| **Dagfesting**: | **16. - 18. juni 2023** |
| **Svimjihøll**: | Páls Høll - 6 x 50m innandura svimjihylur |
| **Adressa**: | Á Oyrunum 17, FO-900 Vágur, vagur.fo/palsholl |
| **Luttakarar**: | JM: Allir svimjarar sum hava junioraldur, tvs. øll sum fylla ml. 15 og 18 ár í kalendaraárinum. |
| | FM: Øll sum frá og við seinasta FM á langgeil hava klárað kravtíð í viðkomandi grein á stuttgeil ella langgeil. |
| | Sí yvirlit yvir kravtíðir, og annars Reglugerð fyri Meistarastevnur |
| **Innboðin feløg**: | FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir |

**í samstarvi við**

Suðuroyar Svimjifelag

ATLANTIC AIRWAYS

### Stevnupartar - Gevið gætur at JM verður avgreitt í morgunriðlunum !

| | |
|---|---|
| 1. partur: | **Fríggjamorgun 16. juni frá kl 09:30** - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 2. partur: | **Fríggjadag 16. juni frá kl 17:00** - FM finalur |
| 3. partur: | **Leygarmorgun 17. juni frá kl 09:30** - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 4. partur: | **Leygardag 17. juni frá kl 17:00** - FM finalur |
| 5. partur: | **Sunnumorgun 18. juni frá kl 08:30** - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 6. partur: | **Sunnudag 18. juni frá kl 14:00** - FM finalur |

Hølllin letur upp til upphiting 1½ tíma áðrenn hvønn stevnupart, sunnudag tó 1 tíma áðrenn.

### Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í Páls Høll 1 tíma áðrenn hvønn stevnupart

Tekniskur fundur fyri venjarar er í Páls Høll 1½ tíma áðrenn fyrsta stevnupart

### Kappingarskrá

| **Dagur 1** | **Dagur 2** | **Dagur 3** |
|---|---|---|
| 1. 800m frí kvinnur*<br>2. 1500m frí menn*<br>3. 200m bringa kvinnur<br>4. 200m bringa menn<br>5. 100m fírvald kvinnur<br>6. 100m fírvald menn<br><br>Steðgur<br><br>7. 4x100 frí mix<br>8. 200m blandað kvinnur<br>9. 200m blandað menn<br>10. 50m rygg kvinnur<br>11. 50m rygg menn<br>12. 200m frí kvinnur<br>13. 200m frí menn<br><br>Steðgur<br><br>14. 4x100m blandað kvinnur<br>15. 4x100m blandað menn | 16. 400m frí kvinnur<br>17. 400m frí menn<br>18. 50m fírvald kvinnur<br>19. 50m fírvald menn<br>20. 100m rygg kvinnur<br>21. 100m rygg menn<br><br>Steðgur<br><br>22. 4x100 blandað mix<br>23. 100m bringa kvinnur<br>24. 100m bringa menn<br>25. 100m frí kvinnur<br>26. 100m frí menn<br>27. 400m blandað kvinnur<br>28. 400m blandað menn<br><br>Steðgur<br><br>29. 4x200m frí kvinnur<br>30. 4x200m frí menn | 31. 1500m frí kvinnur*<br>32. 800m frí menn*<br>33. 200m fírvald kvinnur<br>34. 200m fírvald menn<br>35. 50m frí kvinnur<br>36. 50m frí menn<br><br>Steðgur<br><br>37. 200m rygg kvinnur<br>38. 200m rygg menn<br>39. 50m bringa kvinnur<br>40. 50m bringa menn<br><br>Steðgur<br><br>41. 4x100m frí kvinnur<br>42. 4x100m frí menn |

* Kappingarnar í 800 og 1500 frí verða avgreiddar sum beinleiðis finalur um morgunin

ATLANTIC AIRWAYS

### JM og FM í senn og fyri seg

Hesar báðar meistarastevnur verða avgreiddar í senn í morgunriðlunum, so at Juniormeistararnir verða funnir um morgunin, umframt finalistarnir til FM seinnapartin. JM-svimjarar mugu tó sum hini hava klárað kravtíð í greinini, til at kunna luttaka í nakrari FM-finalu.

Heiðursmerkjahandanin hjá juniorum verður avgreidd um morgunin.

### Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er Marlon Kjærbo og stevnuskrivari Ólavur Hansen.
Yvirdómari eru Katja Lervig og Rúni Gaardbo og startari Ditlev Winther.

### Dómarar

Føroysku feløgini skulu møta við fylgjandi fólki til uppgávurnar sum tíðtakarar, vendidómarar og svimjidómarar: HS, SuSvim og Ægir 5 fólk til hvønn stevnupart; FLOT, FS og Reysti 2 fólk til hvønn stevnupart. Nøvnini skulu sendast til ssf@ssf.fo í seinasta lagi **fríggjadag 9. juni 2023**, t.e. 7 dagar fyri stevnu.

### Tilmeldingar

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði er løgd á data.tempus.fo. Tilmeldingar skulu gerast og váttast á data.tempus.fo í seinasta lagi **fríggjamorgun 2. juni 2023 kl. 06:00**, t.e. 14 dagar fyri stevnu.

Hvør felag fær sínar tilmeldingar aftur sum innlisnar í stevnuforritið, dagin eftir at tær eru móttiknar, at kanna og um neyðugt rætta. Seinar tilmeldingar kunnu gerast á data.tempus.fo fram til **fríggjamorgun 9. juni 2023 kl. 06:00**, t.e. 7 dagar fyri stevnu, tá ið læst verður endaliga fyri tilmeldingum og møguligum útskiftingum.

Loyvt er svimjarum ið hava klárað færri enn 3 kravtíðir, at gera eyka tilmeldingar, so at tey hava upp til 3 kappingar á 100m og styttri á stevnuni.

ATLANTIC AIRWAYS

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til **fríggjamorgun 2. juni 2023 kl. 06:00**, t.e. 14 dagar fyri stevnu; og síðani kr 100 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 400 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til **fríggjamorgun 9. juni 2023 kl. 06:00**, t.e. 7 dagar fyri stevnu.

SSF ger upp luttøkugjøld fyri svimjarar og liðsvimjingar hjá feløgunum, at gjalda í seinasta lagi **týsdag 13. juni 2023**, t.e. 3 dagar fyri stevnu, til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.

Um luttøkugjald ikki er goldið tá luttakara listin skal almannakunngerast, verður felagið strikað av luttakaralistanum.

Goldin luttøkugjøld verða ikki endurgoldin, uttan so at talan er um tekniskan feil, so sum at tann ið flutti kom til at skriva skeiva upphædd í flytingini.

## Frámeldingar

Frámeldingar skulu gerast umvegis venjara-appina app.livetiming.se ella við telduposti til stevnur@ssf.fo - Brúkaranavn og loyniorð til venjara-appina verða send feløgunum tá ið tilmeldingarnar eru innlisnar í stevnuforritið. Burturmist ella gloymt loyniorð fæst við at senda teldupost til stevnur@ssf.fo

Feløg kunnu frítt melda svimjarar og lið frá, fram til **hósdag 15. juni kl. 12:00**, t.e. dagin fyri stevnu. Feløg kunnu eisini frítt melda svimjarar og lið frá finalu, fram til 30 min. eftir viðkomandi innl. riðlar.

Aftaná hetta, má felagið vísa á serliga, óvæntaða orsøk, um ikki væntandi uppmøting skal geva bót. Hesar orsakir kunnu t.d. vera brádliga íkomin sjúka, skaði, ella persónlig orsøk sum ikki ynskist lýst. Felagið skal lata stevnuleiðsluni hesa frámelding, við grundgeving um orsøk, á skrift í seinasta lagi 30 minuttir aftaná viðkomandi start.

Svimjarar sum á hendan hátt eru frámeldaðir aftaná røttu frámeldingartíð, eiga ikki longur at luttaka á stevnuni, uttan við serligari góðkenning frá stevnuleiðsluni.

Væntandi ella ikki góðtikin frámelding, viðførir bót á 500 kr pr start, eins og luttøka í kapping aftaná væntandi uppmøting altíð vil útloysa bót á 500 kr pr start í øllum tí sum viðkomandi ikki møtti til.

ATLANTIC AIRWAYS

## Klagur

Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF, við gjald á kr 500.

## Koronareglur

Hendan stevna verður fyriskipað sambært galdandi almennu koronatilmælum, sí https://korona.fo/tilmaeli?_l=fo

## Beinleiðis úrslit og stroyming

Øll úrslit frá FM á langgeil verða at síggja beinleiðis á www.livetiming.se og live.swimify.com

Ætlanin er eisini at stroyma frá FM á langgeil á YouTube-rásini hjá SSF

## Hugnaløta

Svimjisamband Føroya bjóðar dómarum og hjálparfólkum til smyrjibreyð og drekka í Páls Høll, leygarkvøldið aftaná finalurnar.

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo

**Kravtíðir til FM á langgeil 2023**

At klára á FINA-góðkendari stevnu frá og við **4. juni 2022** (t.e. frá og við **FM á langgeil 2022**)

Loyvt er svimjarum ið hava klárað færri enn 3 kravtíðir, at gera eyka tilmeldingar, so at tey hava upp til 3 kappingar á 100m og styttri á stevnuni.

| Kvinnur | | Grein | Menn | |
|---|---|---|---|---|
| Langgeil | Stuttgeil | 300 FINA point | Langgeil | Stuttgeil |
| 00:35.35 | 00:34.25 | **50 frí** | 00:31.23 | 00:30.26 |
| 01:17.24 | 01:15.06 | **100 frí** | 01:10.07 | 01:07.13 |
| 02:48.77 | 02:44.96 | **200 frí** | 02:32.36 | 02:28.43 |
| 05:53.22 | 05:49.43 | **400 frí** | 05:28.74 | 05:17.05 |
| 12:04.18 | 11:56.03 | **800 frí** | 11:15.37 | 11:02.38 |
| 22:55.01 | 22:53.86 | **1500 frí** | 21:41.13 | 21:06.83 |
| 00:40.30 | 00:38.34 | **50 rygg** | 00:35.85 | 00:33.19 |
| 01:26.64 | 01:22.20 | **100 rygg** | 01:17.45 | 01:13.01 |
| 03:05.32 | 02:58.10 | **200 rygg** | 02:47.18 | 02:37.79 |
| 00:43.91 | 00:42.66 | **50 bringa** | 00:38.76 | 00:37.71 |
| 01:35.79 | 01:33.15 | **100 bringa** | 01:25.29 | 01:23.07 |
| 03:27.80 | 03:21.02 | **200 bringa** | 03:09.22 | 02:59.49 |
| 00:36.49 | 00:36.41 | **50 fírvald** | 00:33.26 | 00:32.49 |
| 01:22.87 | 01:21.57 | **100 fírvald** | 01:14.42 | 01:11.82 |
| 03:01.96 | 02:58.67 | **200 fírvald** | 02:46.57 | 02:41.68 |
| 03:08.29 | 03:02.03 | **200 blandað** | 02:50.29 | 02:43.76 |
| 06:37.88 | 06:26.80 | **400 blandað** | 06:04.24 | 05:51.79 |